# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eingin selir tað, sum ein hevur brúkt alt lívið til at byggja upp. Tað er sum at selja eitt barn*

*(Dyne-Larsen)*

# Løgreglan visti um drápsmannin

**Í novembur í fjør fekk svenska løgreglan eina ábending um, hvør myrdi eina kvinnu í 2000. Næstseinasta leygardag myrdi sami maður Englu Høglund**



*10 ára gamla Engla Juncosa-Høglund bleiv myrd næstseinasta leygardag*

*Mynd: Svenska løgreglan*

Meðan svenska løgreglan fríggjadagin avhoyrdi ein 42 ára gamlan mann í sambandi við, at tann 10 ára gamla Engla Høglund hvarv næstseinasta leygardag, fekk løgreglan at vita, at dna-royndir av manninum samsvaraðu við royndir, sum blivu tiknar í sambandi við eitt morð fyri átta árum síðani.

- Tann 42 ára gamli játtaði næstan beinenvegin, at tað var hann, sum myrdi Pernillu Hellgren, sum bleiv funnin tann 4. juni í 2000, og so viðgekk hann, at hann hevði eisini myrt Englu Høglund, og hvar hann hevði fjalt lík hennara, sigur løgregluovastin í Dalarna, Anders Petterson, við TT.

Løgreglan í Dalarna viðgongur, at í novembur í fjør fekk hon eina ábending um, hvør beindi fyri Pernillu Hellgren, og at talan var um tann 42 ára gamla mannin, sum nú hevur við gingið morðið og morðið á Englu Høglund. Men løgreglan helt seg ikki hava nóg gott próvtilfar, til at hon kundi handtaka mannin.

- Um vit kundu verið sloppin undan hesum seinna sorgarleikinum? Tað er ein neyðugur og rímiligur spurningur, men tað eru ikki vit, sum skulu svara, segði løgregluovastin í Dalarna á tíðindafundi í morgun og sipaði til, at aðrir myndugleikar skulu kanna, um løgreglan bar seg rætt at.



*Pernilla Hellgren bleiv funnin myrd á sumri í 2000*

*Mynd: Scanpix*

# Hungur kann elva til kríggj

**Í seinastuni er prísurin á nógvum matvørum hækkaður nógv kring heimin, og tað kann fáa álvarssamar avleiðingar, sigur stjórin í Altjóða Gjaldoyragrunninum**



*Dominique Strauss-Kahn er stjóri í Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF*

*Mynd: Polfoto*

Dominique Strauss-Kahn, stjóri í IMF, stúrir fyri, at fleiri hundraðtúsund fólk fara at líða hungur, og at øll framstig, sum eru hend tey seinastu tíggju árini, fara fyri bakka.

- Úrslitið verður sosial órógv, sum kann elva til kríggj, segði Dominique Strauss-Kahn á várfundinum hjá IMF í Washingtion um vikuskiftið.

Á fundinum kom fram, at í meðal eru rávørurnar til matvøruídnaðin dýrkaðar 75 prosent tey seinastu átta árini, og tey seinastu trý árini er matvøruprísurin hækkaður 83 prosent. Hendan gongdin hevur elvt til sosiala órógv og bardagar í Haiti og í Egyptalandi, og í Filipsoyggjunum og Vietnam royna myndugleikarnir av øllum alvi at loysa trupulleikarnar.

Í síðstu viku segði Heimsbankin, at vandi er fyri ófriði í 33 londum orsakað av dýrum matvørum. Tað hevur leikað serliga hart á í Haiti, har fimm fólk hava latið lív í ófriði, og tað fekk myndugleikarnar at lækka prísin á rísi 15 prosent fyri at forða meiri ófriði. Samstundis gingu 20.000 arbeiðsmenn mótmælisgongu í høvuðsstaðnum í Bangladesh, Dhaka, har tey mótmæltu, at lønin røkkur ikki til at keypa mat fyri.

Í fleiri londum hava myndugleikarnir verið noyddir at økja stuðulin til matvørur og brennievni fyri at avmarka matvøruútflutningin. Eitt nú hava myndugleikarnir í Teilandi tikið tað stigið, so minni rís fer av landinum, og meiri er eftir til heimamarknaðin.

Stórin í altjóða matvøru- og landbúnaðarstovninum FAO, Jacques Diouf, hevur mælt til ein altjóða toppfund í summar um matvøruprísirnar.

Fleiri altjóða hjálparfelagsskapir vísa á, at tað er serliga tann stóri eftirspurningurin eftir biobrenni, sum hevur trýst matvøruprísin upp ígjøgnum. IMF sigur í sínari seinastu frágreiðing, at helmingurin av prísvøkstrinum stavar frá øktum eftirspurningi eftir biobrenni.

## STUTT SAGT

### Hann seldi sjúklinga-upplýsingar



Ein maður, sum hevur arbeitt í móttøkuni á einum av teimum mest virdu sjúkrahúsunum á Manhattan í New York, er tikin og ákærdur fyri at hava tikið og selt upplýsingar um sjúklingarnar. Maðurin, sum hevur arbeitt á New York-Presbyterian Hospital/Well Cornell Medical Center, bleiv handtikið um vikuskiftið, tá leiðslan á sjúkrahúsinum varnaðist, hvat hann hevði fingist við. Leiðslan sigur, at maðurin hevði atgongd til telduskipanina á sjúkrahúsinum, og at hann hevur tikið og selt upplýsingar um næstan 50.000 sjúklingar tey bæði seinastu árini.

### Brúðgómur tikin fyri morð

Um vikuskiftið skuldu ein 29 ára gamal maður úr Ukraina og ein donsk kvinna giftast á ráðhúsinum í Malmø í Svøríki, men júst sum brúðgómurin bleiv spurdur, um hann vildi hava unnustuna til konu, kom løgreglan stórleypandi inn á ráðhúsið og handtók brúðgómin. Har fekk hann at vita, at hann var skuldsettur fyri dráp, og at hann skuldi á løgreglustøðina alt fyri eitt, skrivar blaðið Sydsvenskan.

Anders Svensson hjá løgregluni í Malmø sigur við blaðið, at tann 29 ára gamli maðurin er skuldsettur fyri eitt sokallað mafia-dráp í Ukraina í nítiárunum, men meiri vil hann ikki siga. Sambært løgreglumanninum vísti danska unnusta hansara, at maðurin var eftirlýstur um allan heimin. Nú situr hann í varðhaldi í Malmø, men ætlanin er at senda hann til Ukraina, tá avhoyringarnar eru lidnar. Vil maðurin ikki samarbeiða við svensku løgregluna, kann hann verða sitandi í svenskum varðhaldi í fleiri mánaðir.